Elin N.W. Tausen
*foreldur*

# Fyrsti skúladagur

Um nakrar vikur er tað fyrsti skúladagur hjá okkara yngstu dóttur. Hon er sera spent. Vit skulu keypa skúlatasku og pennahús. Hon hevur verið og vitjað skúlan og frítíðarskúlan við barnagarðinum, so hon veit, hvar hon fer at ganga í skúla osv. Hon hevur hermt eftir sínum eldru systkjum, at hon eisini hevur heimaarbeiði at gera. Forvitni er stórt til at læra... Ja, fyrsti skúladagur er spennandi hjá bæði børnum og foreldrum.

Men, sum foreldur upplivi eg eitt sindur av órógv, tá eg hugsi um, hvat tað er fyri skúlatilboð, samfelagið hevur at bjóða okkara børnum, nú sparingar vera gjørdar bæði innan skúlan og frítíðarskúlan. Okkara fólkavaldu politikarar vilja hava eitt frálíkt pisa-úrslit, so teir kunnu lyfta høvdið eitt sindur hægri í altjóða høpi. Tosað hevur verið um ein reform innan skúlaverkið, men tað fanst ikki politisk semja um hann, so ongin reformur! Bara fíggjarliga sparingin bleiv framd. Ein sparing, sum ger, at øll tey tiltøk, ið blivu sett í verk eftir »skakandi« pisa-úrslitið eru burturspilt – tí 3-4 ár broyta onki!

Í staðin fyri at menna okkara verandi skúlaskipan og fáa hana at virka optimalt, so er fokus lagt á spurningin, um vit skulu koyra børnini inn í skúlaskipanina sum 6 ára gomul. Heldur man veruliga, at vit fáa betri næmingaúrslit í 9. flokki, um vit lata børn okkara ganga 1 ár longri í føroyska fólkaskúlanum? Einum fólkaskúla, sum í verandi løtu loyvir fleiri og fleiri næmingum at fara úr skúlanum við einum so vánaligum úrsliti, at Skúlin við Áir hevur fingið eina met høga nøgd av umsóknum frá fólkið, ið uppliva at fólkaskúlin ikki hevur kunna møtt teimum.

Eg spyrji bara, hvat er tað fyri skúli, føroyskir politikari síggja fyri sær tey komandi árini? Men, Elin, vit mugu spara á øllum økjum, tí fíggjarligu karmarnir eru sum teir eru! Men eg spyrji, hava vit ráð at spara, tá tað viðkemur okkara dýrabarasta tilfeingi, børnum okkara – framtíð okkara?

Samstundis, sum landið fremur sparingar á skúlaøkinum, hevur Tórshavnar kommuna ætlanir um, at fremja enn fleiri sparingar innan frítíðarskúlavirksemið. Um vit bara hugsa um frítíðarskúlan sum ansing, so bilar tað nokk onki, um tað ikki eru meira enn 4 - 5 vaksin um 60 børn ein seinnapart. Men um tað er bara ansing, eg, sum foreldur, vil hava til mína 7 ára gomlu dóttir, so kann eg gott spara tær 855 kr. og lata mína 13 ára gomlum dóttir ansa henni til eg komi heim. Nei, eg vænti mær eitt frítíðartilboð við námsfrøðiligum innihaldi til barn mítt. Men hvussu kann Tórshavnar komuna bjóða mær tað, tá næstan ongir námsfrøðingar starvast á økinum, tí at tímatalið er so lágt, at ongin klárar at liva fyri tað lønina. Avleiðing verður, at bert ung fólk fara at starvast á økinum, somu ungu, ið hava annað starv í vikuskiftinum fyri at fáa tingini at hanga saman. Eg skilji tey væl, men eg seti spurnartekin við orkuna, tey hava til børnini í gerandisdegnum. Eg vænti, at býráðspolitikararnir í Tórshavnar kommunu ikki bara síggja møguleikan fyri fíggjarligari sparing í frítíðarskúlaskipanini. Men at teir til eina og hvørja tíð, kunnu hyggja okkum foreldur í eyguni og siga, at teir kunnu bjóða okkara børnum eitt dygdargott námsfrøðiligt tilboð. Eitt tilboð, sum gevur okkara børnum spennandi og mennandi avbjóðingar saman við sínum floksfelagum, soleiðis at trivnaðurin verður í hásæti í flokkinum. Tí eitt barn, ið trívist – lærir og mennist.

So nú fari eg, at keypa fyrstu skúlataskuna við míni smílandi dóttur, ið útstrálar gleði og væntan um nýggja tíðarskeiðið í lívinum. So eg smílist aftur og gleði meg saman við henni, men eg kann ikki lata vera við at hugsa um okkara føroysku lands- og býráðs politikarar, sum sita við ábyrgdini fyri hvørjar møguleikar mín dóttir fær, um teir eru sína uppgávu vaksnir. Tí, tá alt kemur til alt, so er tað politiski viljin, ið setur dagsskránna fram um fakligu vitanina. Og velja politikarnir ikki at lurta eftir fakligu vitanini, ja, so verður skúlaskipanin so sum so. Men eg eri bjartskygd, so eg taki dóttrina í hondina, leiðandi fara vit báðar at keypa skúlataskuna og síggja fram til fyrsta skúladag 16. august 2010.



John Johannessen

# Landsstýrið má melda greitt út um korruptión

Tað er als ikki í lagi, at landsstýrismenn kunnu »keypa« sær umrøðu í fjølmiðlunum og redaktionelt velja út, hvørji tíðindi hava týdning at verða borin. Hetta er ein hóttan ímóti fólkaræðinum, ið vit øll hava skyldu til at verja.

Higartil hevur løgtingsmaðurin, Sjúrður Skaale, roynt at vísa á stóra skeivleikan og stóru hóttanina í, at Jørgen Niclassen, landsstýrismaður í uttanlandsmálum, »keypti« sær umrøðu í sjónvarpinum í sambandi við undirskrivingina av granskingarsáttmálanum við ES. Haldi, at Sjúrður Skaale hevur púra rætt í sínum sjónarmiðum og hansara greinar hava verið væl og virðiliga grundgivnar. Men løgið er tað kortini, at tað ikki eru fleiri, ið geva honum rætt, og at hetta málið ikki fær størri umrøðu.

Vit hava ikki eina frælsa og kritiska pressu, tá tað eru politikararnir, ið gera redaktionellu raðfestingarnar. Hetta er eitt stórt sjúkutekin í einum samfelag og er í veruleikanum nakað, sum nærkast korruptión rættiliga nógv. Uppskriftin tykist vera at geva fjølmiðlunum so trongar fíggjarligar karmar sum gjørligt, so teir eru so veikir sum gjørligt, og síðani sum makthavari at rinda fjølmiðlunum fyri positiva umrøðu av sær sjálvum, tá man ynskir tað.

Hetta er ein stórur trupulleiki fyri samfelagið, ein stórur trupulleiki fyri landsstýrið og sanniliga eisini ein stórur trupulleiki fyri fjølmiðlaleiðslurnar.

Tað minsta, ið nú kann henda, er at tað kemur fráboðan frá løgmanni, har hann boðar frá nýggjum greiðum leiðreglum, ið greitt forbjóða øllum landsstýrinum at »keypa« sær pláss fyri positivari umrøðu í fjølmiðlunum og harvið gera seg inn á fólkaræðisliga amboðið við einari frælsari pressu. Vit hava sum sagt øll ábyrgdina fyri at verja eitt væl virkandi fólkaræði – ikki minst løgmaður.

Ynskir man at fáa fjølmiðlarnar betri at lýsa, hvat føroyskir myndugleikar fáast við uttanlands, so eigur hetta at verða gjørt við at styrkja fjølmiðlarnar fíggjarliga og lata teir gera síni egnu val um, hvat er vert at lýsa og hvat ikki.

## Miðlar

Birgir Kruse
*birk@email.fo*



### – Er hetta so, so er talan um eina gølu

Yvirskriftin er tikin úr oddagrein í Dimmu hósdagin. Gølan er føroyska ferðavinnan og arbeiði hennara at branda Føroyar. Ónevnda oddagreinin sipar til tíðargrein hjá Fróða Holm Knudsen týsdagin. Hóast hon fyllir tríggjar óredigeraðar síður, er hon áhugaverd. Men í hægstu agurkutíð fer alt framvið. – Tað, sum undrar, er, at eingin hevur svarað til greinina í Dimmalætting. Larmandi tøgnin er kanska prógv um, at greinskrivarin hevur rætt, og at branding okkara er miseydnað? Er hetta so, so er talan um eina gølu, staðfestir blaðið í oddagrein. Bara eitt fakligt lesarabræv frá Súsonnu Sørensen kom upp í kjakið.

Løgmaður var á ríkisfundi í Skagen, har nógvir streymar møtast. Norðari í Atlantshavi eru aðrir streymar, og løgmaður, ið hevur hægstu nautisku útbúgving, kúvendir. Á Facebook sigur annar viðhaldsbólkurin, at meiningsloysisdiskursurin heldur fram og hin at andstøðu-oyðimarkargongdin heldur fram. Føroyskur politikkur er turrgelt avmaktaður. Her er lítið at siga um einki og minni um nakað. Nada, sum Rudolf sigur. Men Katrin Petersen skal hava rós fyri at sýna ektaða passión í Degi og Viku í samrøðu við løgmann.

Taka vit støði í løgmansrøðuni úr Skagen, so er førleikin at tosa í miðlum á fremmandum máli munin verri hjá nýggja BP formanninum, svianum Carl-Henric Vanberg. Við allan heimin sigur hann, at BP cares about the small people og fer tí ikki at rinda vinningsbýti til eigararnar í ár. Hvør smámaðurin er í oljudálkaða Red Neck landi, fáa vit ikki at vita. Í altjóða miðlum skal ein vara seg at brúka fremmant mál, tá førleikin ikki er til tað.

Men danskt í Føroyum ber væl til.

Av Tórsvølli í grannalagnum hjá útvarpinum, fingu vit uttan varning eitt útlendskt skúlatilboð beint í morgunmikrofonina. Sama dag eru tvær fullsettar greinar í Dimmalætting, har sami útlendski ítróttaskúli bjóðar fram eitt árskeið fyri 12.500 kr. pluss 270 arbeiðstímar, tað er 30.000 kr. pluss ferð til Argentina, sum man kosta 20.000 kr. Til samans um leið 62.500 kr. fyri hvønn føroyska næmingin í skúlanum. Báðar redaktionellu blaðsíðurnar eru óduldar lýsingar, men tað verður ikki upplýst. Kanska hoyra vit seinni, hvussu nógvir føroyingar tóku av tilboðnum og hvussu nógvan pening teir við hetta høvið genereraðu til útlendska skúlan. Tað eru pengar í næmingum, so hetta er marknaðarføring, ið munar.

Tað løgna er at sama blað framhaldandi finst at úttanríkisráðharranum, ið nú hevur váttað, at hann rindar fyri somu tænastu, sum áðurnevndu fingu ókeypis. Í fullum dagsljósi vil hann tryggja sær at føroyskir miðlar eru á staðnum, tá ein søgulig avtala verður undirskrivað vegna tjóðina.

Ein annan morgun í vikuni varð sent beint úr eini nýopnaðari barr, har lurtarin undrast um endamálið, tí frásøgnin í síni heild var uttan mál og mið.

At miðlarnir soleiðis fyri einki verða brúktir og drignir upp á tráð, sigur eingin nakað um. Kanska tí at reklamutænastan verður seld og boðin út í fullum dagsljósi – fyri einki. Sum lesari og lurtari skilji eg púrt einki, um so er at redaktiónirnar vilja leggja seg víðopnar og gera horuarbeiði fyri einki, samstundis sum klagað verður í eyst og vest, at uttanríkismáláráðið dittar sær at betala fyri alla avgreiðsluna, alt íroknað, bara fyri at fáa hina góðu søguna, ið kanska, kanska ikki, vil føra okkum inn í framtíðina.

Eg skilji ikki redaktionella arbeiðið, tá tað verður einoygt og selektivt, og tað í einum og sama miðli.

Er hetta so, so er talan um eina gølu.

*Í mikudagsblaðnum ummæla skiftandi fólk fjølmiðlarnar.*